


*Hesin útlendski kampingbilurin koyrdi spakuliga framvið føroyska skeltinum.*

# Ferðslukunning einans fyri føroyingar

**Hópin av útlendskum bilum hava seinastu dagarnar verið í Kaldbak og vent, tí hóast vanliga farleiðin úr Havnini er stongd í bestu ferðafólkatíð, er kunningin einans á føroyskum**

FERÐSLA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Nú bergholið millum Kaldbaksbotn og Oyrareingir hevur verið afturlatin í fleiri dagar, er Oyggjavegurin einasta leið úr Havnini og norðureftir, men trupult er hjá útlendingum at finna úr Havnini, tí kunningin er bert á føroyskum.

Á skeltinum, ið Landsverk hevur sett upp í rundkoyringini við Hvítanes, stendur á føroyskum “Kollafj. tunnilin er stongt kl. 8.00 -20.00. Koyrið eftir Oyggjarvegnum”. Umframt at útlendingar neyvan vita hvar Oyggjarvegurin er, so er skeltið bert á føroyskum, og tí skilja útlendingar tað ikki. Hinumegin vegin stendur eitt eingin gjøgnumkoyring skelti, men fyri ferðafólk er hetta skeltið ivaleyst bert ørkymlandi, tí tá portalurin var á staðnum í gjáramorgunin, koyrdu tveir útlendskir bilar spakuliga framvið tí. Her er somuleiðis talan um beinleiðis skeiva skelting, lýsingin av skeltinum, ið eitur C21 á fakmáli, er hendan: “C-21 Forboðið øllum akførum. Skeltið setur forboð fyri allari koyring báðar vegir, millum skeltið og næsta vegamót, við undirskelti kann forboðið verða avmarkað til bert at hava gildi við gjøgnumkoyring ella í ávísum tíðarbilum.” Sambært koyrilærara í Havn er eitt skeltið hinumegin vegin ikki eitt undiskelti, so í veruleikanum, hava fólk sambært skeltingini hvørki loyvið til at koyra á Hvítanes, Sund ella Sandvíkahjalla.

Tá Portalurin hitti arbeiðsfólkið, ið leggur kaðal við Sundsverkið, greiddu tey frá, at serliga illa hevði staðið til, tá Norrøna kom á Havnina mánadagin, tá vóru sera nógvir fremmandir bilar, ið koyrdu framvið skeltinum og heilt inn í Kaldbaksbotn, har tey máttu venda og spyrja um leið, men eisini týsdagin var hópin av fólki, ið koyrdi skeivt.

Per Hansen stjóri á Ferðaráð Føroya sigur við Dimmalætting í gjár, at hetta bert er enn eitt dømið um manglandi atlit til ferðafólk, tá skelta verður, og at hann metir hetta vera sera óheppið.

# Coca Cola marknaðarførir Lenu

**Eitt lítið innlegg á kjaktorginum á Myspace síðuni hjá amerikanska tíðarritinum Paste Magazine, og alskurin hjá blaðstjóranum til tónleikin hjá Teiti, gjørdist jarnbrotið hjá Lenu Andersen til stóru marknaðarføringsmaskinuna hjá Coca Cola**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tá Elin Hentze tónleikaumboð legði eini lítil boð inn á heimasíðuna hjá Paste Magazine og hópin av øðrum miðlum og plátufeløgum, umboðsfólkum, um at fara inn á hennara heimasíðu, at lurta eftir føroyskum bólkum og einstaklingur, var tað mest til stuttleikar, men eisini við eini lítlari vón um at okkurt spurdist burturúr.

Tí var tað eisini ein hjartans fegin Elin, ið greiddi okkum frá, at Josh Jackson úr Paste Magazine varð vorðin so góður við tónleikin hjá Lenu, at hann hevði boðið henni at fáa lagið Can’t Erase It við í eitt stórt tónleikatiltak, ið Paste Magazine ger saman við Coca Cola fyri at marknaðarføra óheftan tónleik. Can’t Erase It er eitt av fyribils 10 løgum, ið verður lagt út á tónleikaheimasíðuna hjá Coca Cola, at taka niður ókeypis. Lagið verður bæði tøkt at hoyra, taka niður og sum ringitóni, Lena fær ikki nakran pening burturúr hesum, men her er talan um sera góða marknaðarføring. Hetta er fyrsta tiltak av fýra, so samanumtikið vera 40 bólkar lagdir á heimasíðuna hjá sodavatnsrisanum.

Elin greiðir frá, at Josh Jackson var Teitur fjeppari, og at hann tí gjørdist áhugaður, tá hann fekk áheitanina um at fara inn og lurta eftir tónleiki úr hesum fjarskotna stað. Honum dámdi sera



væl tónleikin hjá Lenu, og setti seg tí í samband við Elina og Lenu, um at brúka lagið Can’t Erase It í hesum sambandi. Eitt tilboð sum Lena glaðbeint tók av.

## Stórur áhugi fyri leikumarknaði

**Nógv børn hava teknað seg til tiltakið, har til ber at selja gomlu leikur sínar í gongugøtuni í Havn leygardagin. Enn ber til at tekna seg.**



BØRN OG UNG
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Ein langur listi av nøvnum á børnum liggur á diskinum hjá kunningarstovuni í Havn í hesum døgum. Hetta eru børn, sum ætla at savnað saman gomlu leikurnar so onnur kunnu keypa tær á leikuloppumarknaðinum, sum verður í gongugøtuni leygardagin.

Tað er kunningarstovan í Havn, sum hevur tikið stig til leikumarknaðin í sambandi við langa leygardagin. Ætlanin er, at øll børn, sum hava hug, kunnu tekna seg hjá kunningarstovuni, sum síðani skipar fyri, at borð og stólar verða sett upp í miðbýnum. Barnið setir síðani sín egna sølubás upp og situr hjá honum og selur gomlu leikur sínar. Tá dagurin er at enda komin, eigur barnið sjálvt peningin, sum forvunnin er.

**Øll eru spent**

Annað verður eisini á skránni langa leygardagin. Eitt nú verður nýggja tjaldið hjá Tórshavnar Ítróttarráð roynt á fyrsta sinni, og verður tað sett upp í Tinghúsgarðinum. Har verður skipað fyri ymiskum, so sum sølubásum hjá handlunum í miðbýnum, mótasýning verður klokkan 13 og okkurt undirhald verður eisini á skránni. Ingigerð á Trøðni, leiðari fyri kunningarstovuna og stigtakari til tiltakið sigur, at børnini og leikumarknaðurin hava eisini møguleika fyri at vera inni í tjaldinum, um veðrið ikki verður til vildar.

Av kunningarstovuni verður sagt, at higartil hava eini 30 børn teknað seg, og at tey sjálvi ringja inn ella møta upp og tekna seg. Mett verður, at børnini eru umleið millum 6 og 13 ára gomul og øll eru ordiliga spent til tiltakið.

Børnini skulu tekna seg í Kunningarstovuni í seinasta lagi fríggjadagin, og leikumarknaðurin verður opin millum klokkan 11 og 15. Tað er ókeypis at taka lut.